# Tann brotni viskarin

Tað er kvøld, veðrið er kalt, og tað er eitt sindur av vindi.

Kristian er farin ein túr. Hann hevur frí í morgin, so nú liggur væl fyri at ganga ein langan túr.

Kristian er 25 ár og býr einsamallur í einum lítlum húsum í Havn. Hann arbeiðir sum timburmaður í Byggiservice.

"Kanska eg skuldi fari at vitja mammu," hugsar Kristian.

"Jú, lat meg heldur gera tað."

Mamma Kristian býr langt har uppi í Hoyvík, so túrurin kemur at taka gott og væl ein hálvan tíma.

Komin upp á Løgmannabreyt sær hann eina gentu ganga langt har frammi á vegnum. Hun hevur gult purlut hár og er um 10 ára aldur. Hon er í kowboybuksum og einum B36 jakka.

Tað byrjar at skýma, hann hoyrir ein hund goyggja, men so er alt kvirt.

Brádliga hoyrir hann ein bil koma við rúkandi fer framvið. Bilurin steðgar longri frammi á vegnum, har gentan gongur. Kristian leggur til merkis, at viskarin á bakrútinum er brotin.

Ein myrkur, høgur maður kemur út úr bilinum, hann tekur í gentuna og roynir at kroysta hana inn í bilin. Alt, Kristian hoyrir, er eitt neyðarslitt lítið skríggj, so verður bilhurðin klamsað, maðurin setur seg í bilin og koyrir avstað. Kristian roynir ar renna aftaná "STEÐGA! STEÐGA!" Rópar hann, men onki hjálpir. Tann svarti Ford Fiesta er horvin.

Kristian stendur sum negldur, hvat er tað, hann hevur sæð?

Eina " BURTURFØRING! "

Tað er nátt, Kristian liggur í seingini og roynir at sova, men fær ikki. Tað einasta, hann hugsar um, er burturføringina, sum hann hevði sæð farið fram um kvøldið. Hann var ikki farin at vitja mammuna. Men var farin beinleiðis til polotiið. Síðani hevði hann sagt teimun alt, ið hann hevði sæð. Poltiið hevði takkað fyri og spurt, um hann ikki mintist nummarplátuna, men hann hevði svarað nei, og teir høvdu biðið hann ringt, um hann mintist meira.

Tað er morgun, Kristian skundar sær upp, tí hann skal til arbeiðis, hann er í sera ringum lag í dag. Hann letur seg í einar bláar arbeiðsbuksur og í eina hvíta blusu. Skundar sær síðani oman í køkin og fær sær eina fulla skál av kornflakes og mjólk. Meðan hann situr og etur, hugsar hann um dreymin hjá sær, hann hevði droymt, at hann giftist við einari konu úr Afrika.

”Sum hatta var ein løgin dreymur,” mutlar hann fyri seg sjálvan. Skundar sær síðani at lata seg í tann bláa arbeiðsjakkan, fær sær skógvarnar uppá og loypur, sum eitt snarljós, út í tann nýggja, fína Volvo og koyrir avstað.

Á arbeiðsplássinum møtir hann Jónsveini, ”góðan morgun Kristian,” sigur Jónsvein glaður.

”Góðan morgun,” mutlar Kristian.

”Nú, ringt lag í dag?”

”Ja, eg havi onki sovið í nátt, men eg má fara, eg skal byggja eini hús í Leirvík.”

”Alt í lagi”

”Ja, bei.”

Á veg til Leirvíkar koyrir hann framvið einum svørtum Ford Fiesta, sum stendur parkeraður við Shell støðina við Streymin. Kristian hugsar ikki so langt, koyrir bara framvið, men høggur síðani bremsuna í, og vendir við aftur.

Ein myrkur høgur maður stendur inn ímóti bilinum og fyllir bensin á, so bara nakkin var sjónligur. Kristian sat sum steinrunnin, er hetta burturførarin?

Jú, viskarin á bakrútinum er brotin. Hetta má vera hann.

Maðurin fer inn í Shell støðina, og Kristian hyggur enn gjøllari at bilinum. Nú sær hann nummarplátuna. Fimm minnuttir seinni kemur maðurin út aftur við einum sigarettpakka og einari øl. Hesuferð sær Kristian andlitið á manninum, hann hevur sítt hár og er hvítur í húðini, hevur blá eygu og eina stóra feita nøs.

Kristian situr og skelvur, hvat er best at gera? Ringja til politiið? Ella hvat?

Maðurin hevur sett seg inn í bilin, og Kristian situr og ivast, men tað er ongin tíð, hann má gera av, hvat hann vil beint nú.

”Jú, lat meg heldur fylgja bilinum,” hugsar Kristian.

Tá ið maðurin hevur koyrt eitt lítið strekkið, tendrar Kristian bilin og heldur síðani spakuliga aftaná honum. Hann letur alla tíðina sín bil vera umleið ein hálvan km aftanfyri bilin hjá burturføraranum. Nú hava teir koyrt eitt fitt petti.

Tað er hálka, kaldur vindur og nú byrjar at hegla.

Kristian koyrir hitan í bilinum meiri frá, hann er ógvuliga kaldur og bangin, ”hvat um hann hevur okkurt vápn?” hugsar Kristian. ” Um hann varnast meg, so er úti við mær!! Tað er nokk best, at eg ringi til politiið og sigi, hvussu vorið er.”

Kristian tekur fartelefonina fram og trýstir nummarið 351448 og ringir.

Tað ringir eina góða løtu, men ongin svarar. Kristian byrjar at ristast. Man nakar fara at taka telefonina? Verður brotsmaðurin nakrantíð handtikin? Er gentan enn á lívi?

Beint sum Kristian skal til at leggja á, hoyrir hann eina rødd í telefonini siga: ”Ja, góðan dagin hetta er politistøðin í Havn, hvussu kann eg hjálpa tygnum?”

”Góðan dagin hetta er Kristian Jakobsen, hevði eg kunnað sloppið at tosað við stjóran?”

”Ja, bíða líka.”

Tað gingu tveir minnuttir, so hoyrdist ein rødd í telefonini.

“Ja, góðan dagin hetta er politistjórin. Hvønn tosi eg við?”

”Góðan dagin hetta er Kristian Jakobsen.”

”Ert tú tann, sum var á politistøðini nú ein dagin?“

“Ja.“ Kristian skalv á málinum.

Síðani segði Kristian alt, sum hann hevði sæð og um støðuna, hann var komin í. Tað, at hann beint nú koyrdi aftan fyri burtuføraranum. Hann segði eisini hvar hann var staddur, og hvussu bilarnir sóu út, og ikki at gloyma, nummarplátuna.

Stjórin hvakk við.

”Hvussu segði tú, nummarplátan var?”

”FE380.”

”Hvat er best at gera, skal eg halda áfram at fylgja bilinum, ella skal eg steðga her?”

Tað gekk ein long tíð, áðrenn stjórin segði nakað. Men so segði hann:

”Nei, halt áfram at fylgja bilinum, og lat hann ikki fáa illgruna til tín. Eg skal senda nakrar politistar út. Koyr inntil tú sært húsini, sum maðurin fer inn í, og steðga so har. Ring síðani til mín, og greið mær frá, hvat hús tað er. So skulu politistarnir taka sær av restini.”

”Ok.”

”Takk fyri hjálpina.”

”Ja, bei.”

”Bei.”

Kristian leggur hornið á. Hann er ógvuliga spentur, men samstundist eisini eitt sindur bangin. Hann hevur fingið eitt arbeiði, sum hann skal gera, og tað vil hann eisini.

Nú eru teir komnir til Funningsfjørð. Kristian koyrir beint aftan fyri bilin hjá burturføraranum, maðurin koyrir ikki so ræðuliga skjótt, so tað er ikki ringt hjá Kristiani at fylgja við.

Kristian er heilt burturi í einari aðrari verð, hann hugsar um gentuna, sum situr onkrastaðni einsamøll og hjartkipt, man hon vera svong? Og hvør man maðurin vera? Og hvat vil hann gentuni?

Veðrið er bara vesnað, og ferðslan er lítil.

Teir koyra spakuliga niðan eftir.

Brádliga gerst Kristian ógvuliga kløkkur og verður skryktur úr tankanum hjá sær. Hann sær, at maðurin, sum situr í bilinum framman fyri, blívur við at hyggja í spegilið, og nú vendir hann eisini høvdinum aftur og hyggur beint í eyguni á Kristiani. Tað rennur kalt niður eftir rygginum á Kristiani, hann byrjar at fáa gásarhold.

“Hevur hann varnast meg? Eg vóni tað ikki!”

Tað er púra kvirt, alt man hoyrir er vindin, sum sussar uttanfyri, og heglingin sum kemur á bilin.

Kristian situr í bilinum og veit hvørki út ella inn. Hvat skal hann nú gera?

Kristian steðgar bilinum, og biður til, at maðurin ikki eisini steðgar sínum bili, men bara koyrir víðari.

Kristian sær, at maðurin hevur sett ferðina eitt sindur niður.

Kristian situr og ristist, hann hevur næstan mist mótið, fer hann at klára tað? Fer hann at koma heiskapaður úr hesum?

Men brádliga setur maðurin ferðina upp aftur og speedar avstað.

“Sum hatta var nær við.” Hugsar Kristian lætnaður um hjartað.

Kristian bíðar eina løtu, tendrar so bilin og koyrir víðari.

Nú er burturførarin nakað longri frammi, men Kristian kann hóma ein bil har uppi.

Kristian sær, at burturførarin snarar inn til Gjáar, og hann fylgir við.

Teir koyra eina løtu.

Nú síggjast tey fyrstu húsini niðri í bygdini, so nú nærkast og Kristian er sera spentur.

Nú koyra teir mitt í bygdini, Kristian er nakað aftanfyri.

Burturførarin koyrir eitt sindur oman í bygdina og vendir síðani ímóti kirkjuni.

Nakað aftanfyri kirkjuna, stendur eitt gamalt lítið hús.

Kristian sær, at maðurin steðgar uttanfyri húsið.

Kristian hevur steðgað bilinum hjá sær beint við brúnna og er farin út, og nú stendur hann og lúrir eftir maninum.

Maðurin fer úr bilinum, og Kristian sær, at hann hyggur sera væl uttan um seg, áðrenn hann fer inn í húsið.

Nústani nú minnist Kristian, at hann skuldi ringja aftur til politistjóran, og hann ger tað beinavegin. Hann sigur honum hvørji hús tað er, og at maðurin er inni har. Politistjórin takkaði mikið fyri og segði, at politistarnir úr Runavík fóru at vera har hvørja løtu. Politistjórin hevði eisini sagt, at Kristian kundi gott fara heim nú, men tað vildi hann ikki, tað var hetta alt ov spennandi til.

Hann setti seg inn í bilin og bíðaði.

Tíggju minnuttir seinni kom politiið á staðið, og teir fóru beina leið inn í húsið.

Teir vóru ógvuliga leingi inni í húsinum, og Kristian undraðist á, hví tað mundi taka so leingi. Men tjúgu minnuttir seinni komu teit út aftur. Tveir politistar hildu í manninum, ein til hvønn armin. Teir settu hann inn í ein politibil.

Lítla løtu seinni kom ein annar politistur út við gentuni í fanginum. Kristian gjørdist so glaður at síggja gentuna á lívi, at hann sang av gleði.

Politiið ringdi til foreldrini, og segði teimun, at dóttur teirra var funnin, og at hon hevði tað gott, og sjálvandi vóru tey eisini sera glað.

Seinni kom ein politistur yvir til Kristian at tosa við hann, politisturin rósti honum og segði, at tað var sera væl klárað. Politisturin segði honum, at teir høvdu funnið gentuna í kjallaranum, og at har niðri hevði staðið ein gomul song og eitt lítið sindur av mati, annars hevði tað ikki verið so nógv har. Hann segði eisini, at burturførarin var ein sinnisjúkur útlendingur úr Sveis, og at hann óivað fór at vera innlagdur inn á psyktriatistku deild.

Kristian var sera glaður um, at alt hevði gingið so væl, nú kundi hann fara heim og hvíla seg. Gentan hevði tað gott og burturførarin var tikin, so nú var alt, sum tað plagdi at vera.

Heim aftur komin legði hann seg at sova og vaknaði ikki fyrr enn morgunin eftir.

Um tíggju tíðina gongur hann sær ein túr oman í bakaríið, tað er kalt, men ongin vindur. Hann keypir sær eitt morgunbreyð, ein kopp av kaffi og Dimmalættingina fyri dagin.

Fer síðani til gongu heim aftur.

Inn aftur komin letur hann seg úr skónum og jakkanum, fer inn í køkin og sker sær eina stóra tjúkka flís av breyðinum og fær sær ost uppá.

Setur seg niður í sofuna við Dimmuni og morgunmatinum og fær sær ein slurk av kaffinum.

Tá ið hann blaðar upp á fyrstu síðu í Dimmuni, gerst hann ógvuliga bilsin, tí yvirskriftini ljóðar:

“Kristian var ein hetja!“


| | | |
|---|---|---|
| *Ásvør Joensen* | *Sára Tausen* | *Una Olsen* |
| *Hjallavegur 18, 600* | *Hjallavegur 9, 600* | *640 Rituvík* |
| *Saltangará* | *Saltangará* | *448634/275634.* |
| *448767/266279.* | *448352/269352.* | *7.A. Glyvraskúli.* |